Ítróttar
Sosialurin

Nr. 110 • mánadagur • 12. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jakob skal venja strandingar

**Veteranurin ætlar sær í vetur at royna seg sum venjara burturav. Við sær til StÍF hevur hann eisini Finn Hansson**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast hann fleiri ferðir áður hevur luftað tankanum um at gevast við aktivu hondbóltstilveruni, so tykist tað hesa ferð vera álvari í orðunum hjá Jakob Jónsson.

– Tað er so ikki ætlanin, at eg skal spæla nakað sjálvur. Leiðslan hjá StÍF hevur tó givið mær fríar teymar til at gera av, hvussu verður við hesum partinum, men eg haldi, at málið fyrst og fremst má vera at menna mongu ungu spælararnar á liðnum. Og tað er ein uppgáva, sum eg gleði meg til, staðfestir Jakob.



*Eftir at hann í átta ár hevur gandað á føroysku hondbóltsvøllunum, ætlar Jakob Jónsson sær at arbeiða sum venjari burturav*

### Tekniskur hondbóltur

Síðani hann kom til Føroya fyri á leið 8 átta árum síðani, hevur Jakob støðugt verið roknaðust millum fremstu spælararnar í landinum. Tekniskt hevur hann alla tíð skarað framúr, og tað man vera lítil ivi um, at hansara hondbóltsfatan verður sett ovarliga, nú hann skal venja StÍF.

Í so máta kundi hann valla valt sær eitt betri lið at vant.

– Sjálvandi havi eg eisini hugsað um tann partin. StÍF hevur í fleiri ár havt eitt lið, sum spælir kvikan og tekniskan hondbólt, og tað talar avgjørt til mína hondbóltsfatan. Og í so máta passar Finnur Hansson eisini væl inn í myndina.

Finnur hevur hetta seinasta árið spælt hondbólt í Íslandi, men familjan treivst ikki nóg væl, og tí varð longu fyri nøkrum mánaðum síðani gjørt av, at hann skuldi aftur til Føroya. Men tað er ikki fyrr enn nú, at navn er sett á nýggja felagið.

### Bíðar við reypinum

Aðra staðni á síðuni sæst, at formaðurin í StÍF hevur góðar vónir til nýggja kappingarárið, men enn fæst nýggi venjarin ikki at siga nakað um, hvar hann ætlar sær at liggja.

– Eg plagi sjáldan at reypa, fyrr enn eg standi við heiðursmerkjunum, so eg fari ikki at seta nakra ávísa plasering sum mál. Sjálvandi vilja bæði eg og spælararnir altíð royna okkara ítarsta, men hvussu langt tað røkkur, mugu vit so finna út av á vegnum, heldur Jakob Jónsson.

## Tummulin vendi niður

**NSÍ fer ikki at binda seg til nigerianskan álopsspælara, sum hevur royndarvant í Runavík**

NSÍ
*Jóannes Hansen*

Ein nigerianskur álopsspælari hevur royndarvant við NSÍ tríggjar ferðir. Teir í NSÍ hava mett, um teir skuldu gera avtalu við 25 ára gamla fremmanda mannin, sum eitur Victor Ezeji. Tað verður av ongum, tí í løtuni heldur NSÍ seg ikki hava brúk fyri álopsspælara av hesum slagnum.

Victor Ezeji kom til Runavíkar úr Viborg, har hann hevur royndarvant. Hann hevur eisini royndarvant í Horsens, har Kent Nielsen ikki helt seg hava brúk fyri honum. Venjari í Viborg er Flemming Nielsen. Hjálparvenjari hjá honum er Tommy Møller Nielsen. Tað er Tommy, sum í samstarvi við Jákup í Stórustovu hevur syrgt fyri, at nigerianski álopsspælarin kom henda vegin.

Í 2003 var um reppið, at Viborg skrivaði sáttmála við henda Victor Ezeji, men tað varð av ongum, tí samráðingarnar við felagið hjá honum í Nigeria endaðu úrslitaleysar.

# StÍF ætlar sær upp í toppin

**Formaðurin heldur, at felagið, sum eigur undirtøku millum nógvar eysturoyingar, hevur fyritreytir fyri góðari framtíð**

HONDBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Formaðurin í Stranda Ítróttarfelag, Andrass Danielsen, er væl nøgdur og spentur, nú teir hava tryggjað sær góðan venjara og leikligan styrk.

– Vit eiga gamalt hondbóltsfelag, sum tað er stórur áhugi fyri. Ikki bara her á Strondum og á Skála, men kring allan fjørðin og eisini hinumegin Gøtueið og í Sundalagnum. Áskoðarar koma úr allari oynni at síggja heimadystirnar hjá StÍF. Í fjør sleptu vit endanum í landskappingini og endaðu á fjórða plássi. Í steypakappingini gekk so mikið væl, at vit vunnu finaluna, sigur Andrass Danielsen.

Sigurin í steypafinaluni gevur StÍF møguleika at taka lut í Europa Cup, men tí møguleikanum ætla strandingar ikki at taka av:

– Tað er ein spurningur um pengar, og so telur tað eisini við, at summir av spælarunum eru upptiknir av fótbólti inntil eina ferð í oktober mánað. Jacob Jónsson hevur stevnt spælarunum til fundar nú hóskvøldið. Tá fara teir at tosa um, hvussu venjingarnar skulu vera. Vit miðja eftir at vera við í toppinum – bæði í landskappingini og steypakappingini.

Í fjør stóð StÍF seg væl í kappingini millum dreingir 16 ár, og einstakir eitt sindur eldri enn tað hava eisini víst góð evni:

– Vit hava roknað við, at fleiri teirra hava møguleika at fara at gera seg galdandi. Tí er tað, at vit hava sett nýggja venjaran. Sáttmálin fevnir um eitt ár. Um tað riggar væl hjá honum, so hava vit einki ímóti, at talan verður um samstarv í fleiri ár, sigur Andrass Danielsen á Strondum.

Rumenin Bogdan Burcia hevur verið venjari á Strondum. Málverjin Marian, sum eisini er úr Rumenia, hevur vart málið hjá strandingum síðani 2001. Hann er heima í Rumenia og heldur frí. Ætlanin er, at hann skal koma aftur til Strendur at verja málið hjá StÍF.